DAGSINS MEINING

Ein lúsingur fyri tann asosiala politikkin

Ein veljarakanning er bara eitt politiskt barometur og hevur ikki nakran týdning fyri, hvussu løgting ella landsstýri er sett saman, men ein meiningarkanning kann kortini ávirka tann aktuella politikkin, alt eftir hvussu veljarakanningin verður tulkað.

Tann seinasta veljarakanningin gevur Tjóðveldisflokkinum ein frammaná, samstundis sum hon er eitt dygt herðaklapp til Sambandsflokkin. Í eini roynd at greina úrslitið í Degi og Viku, og í kjaksendingini Fokus, varð rættiliga stórur dentur lagdur á fullveldismálið.

Tjóðveldisflokkurin fekk av álvara vind í seglini eftir bankakreppuna, tá allur leikurin hjá dønum handan politisku leiktjøldini varð avdúkaður, og flokkurin gjørdist fyri fyrstuferð størsti flokkurin í 1998. Síðani hevur hann sett sjálvstýrismálið meira ella minni út í kortið og slóðað fyri í figgjar- og búskaparpolitikkinum.

Men nú eru broytingar farnar fram. Fullveldismálið er lagt til viks og rikin verður ein varligur sjálvstýrispolitikkur eftir gomlu heimastýrislógini. Harafturat treingist um figgjarliga og tað merkir sparingar og broytingar í føroyska samfelagnum. Júst her er ein andsøgn millum vanligan tjóðveldispolitikk, lyfti hjá tjóðveldisflokkinum og tann veruleika, sum nú verður avdúkaður.

Tað er møguligt, at tað hevur ávirkað undirtøkuna, at loysingarøsingin hevur lagt seg, men afturgongd-in hjá Tjóðveldisflokkinum kemst eisini av tí eftir okkara metan meira og minni asosiala politikki, sum flokkurin hevur borðreitt við ta seinastu tíðina, bæði í vár og aftur nú í samband við figgjarlógaruppskotið.

Flokkurin hevur áður ofta verið tann sosiali garanturin saman við Javnaðarflokkinum, men í dag siggja vit, at flokkurin er hamskiftur, og summir politikkarar floksins eru so akademiskir og borgarligur, at heimstaðurin var heldur í Fólkaflokkinum ella í Sambandsflokkinum. Tey inntrivini, sum hava rakt føroysku familjuna, gera, at tað eru summi sosialt tilvitandi fólk, sum venda flokkinum baki.

Flokkurin hevur verið við at gera tað nógv trengri hjá føroysku húsarhaldunum: mjólkarprísurin er hækkaður, sjónvarpsgjaldið er hækkað, ferðaseðlaprísurin er hækkaður, rentufrádrátturin fyri sethúsalán er lækkaður, uppihaldspeningur hjá fráskildum skal strikast og nú koma nøkur brúkaragjøld afturat. Hetta ávirkar heilt greitt umdømi Tjóðveldisfloksins millum vanligar føroyskar veljarar, sum skulu venda hvørji krónu mótvegis teimum væl bjargaðu politikkarunum.

Tað er kanska eitt sindur torført at greina, hví Sambandsflokkurin hevur so stóra framgongd í dag, nú sjálvstýrismálið er komið í eina meiri friðarliga legu, samstundis sum formaðurin ikki er serliga sjónligur í politikki. Afturímóti hevur flokkurin einar 3-4 áleyparar, sum eru nógv frammi, og tað er heilt givið, at teir hava givið flokkinum íblástur, so fólk leggja meira og meira merki til flokkin. So er spurningurin, um henda gongdin fer at halda sær til eitt komandi val, ella um heilt onnur mál eru á dagsskránni tá.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ein rættvísan og greiðan fiskivinnupolitikk

Yvirlýsing frá Føroya Javnaðarflokki

Tað er bráðneyðugt at lógin um vinnuligan fiskiskap verður endurskoðað, soleiðis at hon gerst einfaldari og greiðari. Hetta samtykti løgtingið í febr. 2003 eftir uppskoti frá Javnaðarflokkinum. Umframt hesa lógarteknisku endurskoðan eru tó serliga trý øki, sum krevja munandi broytingar:

1. Fiskiloyvi og fiskidagar
2. Útróður við smábátum
3. Málsviðgerðin, tá fiskidagarnir verða ásettir

1. Fiskiloyvi og fiskidagar:
Tað óskil, sum í dag valdar, har loyvi frá fleiri smærri bátum, eitt nú størri útróðrarbátum, kunnu leggjast saman til størri skip, sum síðan fáa loyvi í einum bólki, har tey als ikki hoyra heima, má steðgast. Sama ger seg galdandi, tá tað snýr seg um tað óskil, sum valdar, tá menn fritt kunnu selja fiskiloyvi, sum eru fingin fyri einki, fyri risavinning. Hetta hendir mangan fleiri ár eftir at skipið, teir høvdu, er farið úr flotanum. Eisini eru dømi um, at skip hava fingið tillutaða íslandskvotu, tó at tey als ikki hava fingist við húkaveiðu.

Ungir virkisfýsnir menn, sum vilja sleppa framat í vinnuni, kunnu bert gera hetta við at keypa umframt skip eisini dýr fiskiloyvi, sum als eingin figging fæst til. Tí vila figgingarstovnarnir hava, at loyvini skulu kunna veðsetast.

Tilmæli: Mælt verður til, at ein Fiskidaga- og Loyvisbanki verður settur á stovn, sum Fiskimálaráðið skal hava ábyrgdina av. Óbrúkt loyvi og óbrúktir dagar fella aftur til bankan, sum síðan kann lata øðrum rættindini at brúka, um hetta er í tráð við yvirskipaða fiskivinnupolitikkin. Fiskiloyvi fáa menn brúksrætt til, og verður tað bert sjálvt brúkið av loyvinum, sum avger, at teir kunnu sita við loyvinum. Sjálvsagt skulu menn hava vissu fyri, at fiskiloyvi verður til júst teirra skip ár um ár, so leingi skipið er í vanligum rakstri. Eitt gjald verður kravt fyri loyvið. Hetta er neyðugt til tess at fáa staðfest, at fiskiríkidømið er ikki ogn hjá tí einstaka, men hjá fólkinum. Tá tú hevur loyvi fyri eitt avgjald, so er tað prógv um, at tú ikki eigur tað, og tískil kanst tú so heldur ikki sjálvur umseta tað. Umsetingin av fiskiloyvum og óbrúktum fiskidøgum fer tá at fara fram gjøgnum Fiskidaga- og Loyvisbankan, men skipað og uttan spekulasjón.

2. Útróðrarflotin
Útróður er ein aldargamal partur av okkara mentan. Tó at vit í dag hava fullriknar útróðrarmenn, so er tað enn soleiðis, sum vanligt altíð hevur verið, at menn brúka útróður sum partvísa vinnu. Hetta er ein partur av okkara samleika sum føroyingar. Eisini hevur útróðurin stóran týdning fyri lív og trivnað á útoyggjum og í útjaðara. Útróðrarflotin er rættiliga nógv avmarkaður av veðri og streymi.

Í dag er skipanin tann, at eisini útróðrarflotin undir 15 brt, sum avreiðir, skal hava eitt fiskiloyvi. Fullriknir (5A) hava egna kvotu, meðan hin bólkurin (5B), har menn eisini hava aðra inntøku, fiska av felagskvotu. Hvørja viku lata teir inn seðlar við avreiðingardøgum. Bólkur 5B er einasti bólkur higartil, sum enntá fleiri ferðir er lagdur í einum fiskiári, tí dagarnir eru uppi. Skipanin við fiskiloyvum ger, at gamlir fúnaðir bátar, sum sambært lógina eiga rætt til fiskiloyvi, verða keyptir upp. Tí ger tað seg aftur galdandi her, at tað er sera trupult og kostnaðarmikið fyri ungar menn at koma inn í útróðrarvinnuna.

Tilmæli: Mælt verður til, at allir útróðrarbátar undir eina ávísa stødd ikki verða undir fiskidagaskipanini. Eisini verður mælt til, at fiskakeyparar einsamallir fáa skyldu at boða frá um dagar og nøgd.

3. Málsviðgerðin, tá fiskidagarnir verða ásettir
Tilráðingin fer fram í fleiri liðum. Fyrst kemur ICES við einum tilmæli, sum Fiskirannsóknarstovan síðan arbeiðir víðari við. Harumframt tekur Fiskirannsóknarstovan egnar metingar við eitt nú av yvirlitstrolingum, yngulskanningum o.l. Teir senda síðan eitt tilmæli til Fiskimálaráðið. Hetta var seinasta ár ein tilráðing um ein niðurskurð upp á 30% komandi fimm árini.

Síðan kemur fiskidaganevndin, sum er umboðað av vinnuni, við sínari tilráðing. Henda byggir á metingar, sum vinnan hevur gjørt í farna ári. Fiskidaganevndin sendir sína tilráðing til Fiskimálaráðið. Henda var seinasta ár, at eingin niðurskurður skuldi gerast.

Í triðja lagi biður Fiskimálaráðið ella okkurt felag um tilráðing frá íslendskum serfrøðingi. Henda var seinasta ár, at eingin niðurskurður skuldi gerast.

Í fjórða lagi ger so Fiskimálaráðið eina tilráðing til Løgtingið, sum byggir á tær mongu og ymisku tilráðingarnar, sum ráðið hevur fingið. Seinasta ár var henda, at eingin niðurskurður skuldi gerast.

Og endaliga samtykti Løgtingið ein niðurskurð upp á 1%.

Tilmæli: Sett verður nevnd, sum umboðar allar avvarðandi bólkar (fiskifrøðingar, vinnuumboð á sjógvi, vinnuumboð á landi, búskaparfrøðingar og møguliga onnur), sum síðan skulu geva Fiskimálaráðnum eitt felags tilmæli, galdandi fyri eitt ár, møguliga fyri fleiri ár.

Jólaborðhald í Fuglafirði

TÍÐINDASKRIV
Frá Fuglafjarðar Sjónleikarafelag

Vitandi at nógv óvissa hevur verði um Mentanarhúsið og tey tiltøkini, sum skuldu verða í húsinum í ár, vilja vit boða frá, at tey sera væl umtøktu Jólaborðhaldini, sum vóru hildin seinasta ár, verða aftur í ár.

Jólaborhaldini verða í Mentanarhúsinum, leygarkvøldini 29. november, 6. og 13. desember. Øll kvøldini verður byrja klokkan 19.00.

Borðreitt verður við køldum og heitum rættum, meðan Magni Poulsen undirheldur. Eisini verður felagssangur.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Landsstýrismaðurin í lógarmálum villleiðir enn einaferð

Johan Dahl
Løgtingsmaður fyri sambandsflokkin

Í samband við at fjølmiðlarnir hava gjørt nógv burtur úr málinum, har føroysk ítróttarfeløg hava verið undir illgruna fyri at hava tikið í arbeiði útlendsk ítróttarfólk uttan arbeiðs- og uppihaldsloyvi, dregur landsstýrismaðurin í lógarmálum eisini hettar málið niður í fullveldis- politiska runudíkið, eins og hann villleiðir fólkið.

Villleiðingin byrjar
Í Dimmalætting sigur landsstýrismaðurin í lógarmálum tann 11. november 2003 í samroðu við blaðmann, **at tað kom óvart á hann, at umstøðurnar hjá ítróttarfeløgunum í samband við útlendskar leikarar eru sum tær eru.** Sostatt viðgongur landsstýrismaðurin, at hann ikki hevur innlit í galdandi lóg á økinum. Vert er at leggja til merkis, at landsstýrismaðurin úttalar seg vegna sonevnda føroyska løgmálaráðið, t.v.s. vegna embætismannaverkið, hann hevur aftan fyri seg.

Viðari sigur landsstýrismaðurin, at **danir hava lóggávurættin og skyldguna á økinum og kann hann einki gera, sum bøtur um umstøðurnar hjá feløgunum.** Vit síggja, at undirgravingin av ríkisfelagsskapinum heldur áfram og danska innanríkisráðið verður útrópt sum syndabukkur.

Sum vanligt dregur landsstýrismaðurin málið - og í hesum føri ítróttin og okkara ungdóm niður í fullveldispolitiska runudíkið, tá hann m.a. sigur, **at samráðingarnar um yvirtøku av útlendinga-økinum eru komnar undir land og tá málsøkið er yvirtikið, roknar hann við betri umstøðum fyri ítróttarfeløgini.** Við øðrum orðum sigur landsstýrismaðurin sum ikki einaferð, at einki kann gerast við málið, fyrr enn málsøkið er yvirtikið.

Hóast landsstýrismaðurin í byrjanini av samróðuni segði seg einki kunna gera, sigur hann at enda í samróðuni, at **"hann fer at kanna, hvat gerast kann fyri at bøta um umstøðurnar hjá feløgunum".** Samanumtikið kann ikki sigast annað, enn at viðmerkingarnar eru ein snildisligur og manipulerandi orðavavstur frá einum landsstýrismanni, sum annars er settur at umsita galdandi lóggávu og fremja løgtingssins vilja objektivt.

Landsstýrismaðurin trekkir í land
Í Dimmalætting tann 15. november 2003 trekkir landsstýrismaðurin í stuttari viðmerking í land og sigur, **at hann fer at kanna, um tað ber til at finna eina skipan sum ger, at føroysk ítróttarfeløg fáa lagaligari arbeiðsumstøður,** eins og hann snildisliga leflar fyri teimum eldsálum, sum reka føroysku ítróttarfeløgini. Eisini sigur landsstýrismaðurin seg nú hava bíðið um fund við danska integrationsmálaráðharran um málið. Við øðrum orðum viðgongur landsstýrismaðurin nú, at møguleiki er fyri, at danskir og føroyskir myndugleikar í félag kunnu finna eina loysn. T.v.s. at hann nú asannar, at møguleikarnir innan karmarnar av ríkisfelagsskapinum ikki hava verið royndir.

Eftir stendir tó villleiðandi viðmerkingin frá landsstýrismanninum í Dimmalætting tann 11. november óátala, eins og vit enn einaferð kunnu staðfesta, at politiska skipanin og fjølmiðlarnir ókritiskt hava góðtikið villleiðandi og manipulerandi politiska fullveldisvirksemi, har talan við røttum átti at veri um objektivt löggávuarbeiði, ítróttarfeløgunum og vanliga fólkinum til góðar.

Samandráttur
Sjálvandi ber tað føroyskum politikarum til at arbeiða fyri lógarbroytingunum innan málsøki, sum ríkismyndugleikarnir umsita, eins og tað ber til at arbeiða fyri, at neyðugar kunngerðir verða settar í gildi í Føroyum.

Sum sakfórarin hjá einum av ítróttarfeløgunum eisini ger vart við í Dimmalætting tann 14. november 2003, er tað bert ein spurningur, hvat politiski myndugleikin velur at nýta arbeiðsorkuna til.

Undirritaði hevur í undanfarnu viku havt sera konstruktivar samrøður við departementschef Niels Preisler í danska Integrationsministeriinum í samb. við málið um báðar VB-hondbólts spælararnar ,ið komu í trupuleikar í í samb. við uppihalds-og arbeiðsloyvið í Føroyum og var gjørt púra greitt av Niels Preisler, at viljin hjá Integratiónsministeriinum er at finnað eina loysn, - eftir einum leisti sum heimastýrið vil hava hana og vilja gera sítt til, at tað í framtíðini verða púra avkláraðar linjur millum londini í spurningum um uppihalds og arbeiðsloyvir hjá útlendingum í Føroyum.

Síggi eisini í grein í Dimmu ídag, at Tobbi í gjár hevur fingið sama svar frá Preisler .

Niðurstøðan kann tí nevniliga bert vera tann, at lítil og eingin politiskur áhugi er fyri teimum lógum, sum viðvíkja vanliga gerandisdegi føroyinga. Løgfrøðiliga arbeiðsorkan og harvið peningur skattaborgarans verður hinvegin nýttur til at reka fullveldispolitikk, t.v.s. fyrireika yvirtøkur, sum í stóran mun ivaleyst ikki gerast veruleiki.

Álitið á løgmálaráðið,ið sigur seg vera nærum til reiðar at yvirtaka løgreglu og rættarskipan, kann tí eftir mínum tykki liggja á einum sera lágum støði.

Vónandi eru seinastu veljarakanningarnar ein ábending um, at alt fleiri fáa eyguni upp fyri innantómu undirgravingini av ríkisfelagsskapinum. Tí ríkisfelagsskapi, sum annars hevur verið karmur um - og grundarlagið undir vælferðarsamfelagnum og rættarsamfelagnum Føroyar.

Høgni Hoydal og hansara menn burdi vaknað, fari runt um landið, vitja almennar stovnar, og privat vinnuvirkirvirkir, tosað útróðrarmenn og arbeiðsfólk, - við vanliga føringin og harvið hoyrt og sæ hvussu dagligdags Føroyar og føringar livað og virkað , - eisini uttan fyri miðstaðarøkið.

Svar til Finnleif Guttesen

Mikkjal Helmsdal
sjónvarpsstjóri

Í einum opnum fyrispurningi til sjónvarpsstjóran setir Finnleif Guttesen fram spurningin, hvørt ætlanir eru um at teksta tey íslendsku innsløgini í sendingini Grannar til føroyskt. Hugskotið við Grannar hevur øll árini, síðani sendingin byrjaði miðskeiðis í 80'unum, verið, at innsløgini á norðurlendskum máli skuldu sendast ótekstaði, so hyggjarin fekk høvi til at venja oyrinu við mál, ið hann ikki er vanur at hoyra. Hetta hevur havt við sær, at íslendsku og svensku innsløgini hava verið ein trupulleiki fyri nógvar hyggjarar, tí meirilutin av fólkinum skilir ikki hesi mál. Av tí sama hevur eisini javnan verið upp á tal innanhýsis í SvF at teksta hesi innsløg, men niðurstøðan hevur hvørja ferð verið, at tað vil vera at ganga ímóti grundtankanum við sendingini. Grundhugburðurin undir sendingini hevur frá byrjan verið at raðfesta ein málpolitikk, ið miðar eftir at skapa málsligt forstáilsi millum Norðurlondini, fram um kunningina og innihaldið í norðurlendsku tíðindunum. Eg kann geva Finnleivi Guttesen rætt í, at tað er tíð upp á at gera upp við hesa raðfesting. SvF fer tó neyvan undir at teksta Grannar nú. Ætlanin er at taka sendingina av skránni frá 1. januar. Norðurlendsku tíðindini verða í staðin innarbeidd í Dag og Viku, og har verða øll svensk og íslendsk innsløg tekstað.

Ikki Almannaráðið

Av ósketni eru tvey landsstýrisráð komin í bland í grein í blaðnum um Jákup Mørkøre og sakarmál. Mistakið var, at vit skrivaðu, at Almannaráðið fer ikki at leggja málið viðvíkjandi Jákup Mørkøre inn fyri Landsrættin. Tað skuldi standa Heilsu- og familjuráðið. Haldið okkum til góða.

Blaðstj.

Til øll ung í Føroyum millum 13 og 18 ár

Í vikuskiftinum 13. til 15. februar 2004 skipar Norðurlandahúsið fyri ungdómslista-stevnuni , Ung í Føroyum 2004

STEVNA
Tíðindaskriv

Stevnan er ein lega, har pláss er fyri 60 luttakarum.

Skráin er hendan:

Fríggjakvøldið letur ein myndlistaframsýning upp í Norðurlandahúsinum við verkum, sum tit hava latið inn, og har verða pallframførslur við tónleiki, sjónleiki, dansi, filmi ella øðrum, sum tit sjálvi vilja sýna fram. Tit kunnu luttaka við fotoframsýning, tónleikabólki, sangi, mótasýning, sjónleiki, video, tekningum, málningum, yrkingum, søgum, standmyndum, dansi, ella onkrum heilt øðrum, sum ongin annar hevur hugsa um at sýna fram áður. Til ber at luttaka í bólkum, tó ikki við meira enn 5 luttakarum í hvørjum bólki.

Leygardag og sunnumorgun verða hesar verksmiðjur undir leiðslu av viðurkendum listafólkum:

- Tónleikur v/ Eivør Pálsdóttir, tónleikara
- Sjónleikur v/ Hans Tórgarð, sjónleikara
- Skriving v/ Marionnu Debess Dahl, rithøvunda
- Design v/ Svanhild Strøm, sniðgeva
- Myndlist á teldu v/ Inga Joensen, grafikara
- Dansur v/ Elsu Mariu Bærentsen, dansara
- Myndlist fyri ung við serligum tørvi v/ Karstin Olgar Lamhauge, myndlistamanni

Henda verksmiðjan vendur sær til ung, ið á onkran hátt hava brek. Í hvørjum einstøkum føri verður mett um, um neyðugt verður at hava egið stuðulsfólk við sær, og um luttakarin skal gista saman við hinum ella heima.

Luttakararnir og verksmiðjuleiðarin avgera í felag, hvat hvørja verksmiðja fevnir um. Bæði roynd og minni roynd sleppa framat, hvør á sínum støði. Uml. 10 ung eru í hvørjari verksmiðju (uttan í verksmiðjuni fyri ung við serligum tørvi, har støddin á bólkinum verður avgjørd eftir, hvat leiðarin heldur vera hóskiligt). Verksmiðjur kunnu arbeiða hvør sær ella samstarva um eitt felags úrslit.

Sunnudagin kl. 17 verður stór sýning fyri almenningini við úrslitunum úr verksmiðjunum. Páll Danielsen samskipar hesa sýning.

Sum nakað nýtt hesaferð bjóða vit trimum ungum at vera við í einum tíðindabólki. Hesi skulu fylgja við stevnuni, framleiða tilfar til heimasíðuna og gera eitt stevnurit. Tað er ein fyrimunur at duga at fáast við teldu og heimasíðugerð.

Øll gista í fótbóltshúsunum í Gundadali; máltíðir, framførslur og verksmiðjur verða í Norðurlandahúsinum.

Tikið verður ímóti tilmeldingum fram til 15. desember 2003.

Meira kunning um verksmiðjurnar er at lesa á heimasíðu Norðurlandahúsins: www.nlh.fo

Mentamálaráðharrin Annita á Fríðriksmørk er verndari fyri Ung í Føroyum 2004. Samskiparar fyri verkætlanini eru Rakel Helmsdal og Hedvig Westerlund-Kapnas. Norðurlandahúsið skipar fyri stevnuni og Mentamálaráðið og Tórshavnar Býráð stuðla.